Álit

í

løgtingsmáli nr. 38/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av farsóttarmálsøkinum)

Løgmaður, Aksel V. Johannesen, hevur lagt málið fram tann 17. januar 2023, og eftir 1. viðgerð 19. januar 2023 er tað beint Uttanlandsnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2. februar 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landslæknan, landsstýrismannin í heilsumálum, Margit Stórá, og løgmann, Aksel V. Johannesen.

Ein samd nevndi vísir á, at Føroyar komu væl ígjøgnum koronufarsóttina í mun til onnur lond. Tó hevur tíðarskeiðið víst okkum, at farsóttarmálsøkið eigur at vera á føroyskum hondum.
Í eini kreppustøðu er tað umráðandi, at frástøðan til avgerðarmyndugleikan er stutt, og at landsins borgarar fáa greiða og týðiliga kunning, ið er til at skilja.
Tá koronufarsóttin herjaði, gekk tað skjótt upp fyri politisku skipanini, at rætt og neyðugt var at farast skuldi undir at yvirtaka málsøkið. Nevndin er eisini samd um, at rættast er at yvirtaka farsóttarmálsøkið.

Tað er onki at ivast í, at samfelagið og myndugleikin í Føroyum eru búgvin til at taka ábyrgd á hesum málsøkinum og at skipa føroyskar loysnir eftir egnum fortreytum.
Landsstýrið hevur upplýst, at fyrisitingin, sum skal umsita føroyska farsóttarmálsøkið, verður klár, áðrenn málsøkið formliga verður yvirtikið 1. januar 2024.
Uppgávur og heimildir viðvíkjandi farsóttum, sum í dag liggja hjá Landslæknanum og hjá danska ráðharranum og Sundhedsstyrelsen, verða eftir 1. januar 2024 fluttar til ávikavist Fólkaheilsustýrið og landsstýrismannin í heilsumálum.

Við hesum lógaruppskoti verður farsóttarmálsøkið formliga yvirtikið, og harvið fáa føroyskir myndugleikar lóggávuvald og útinnandi vald á málsøkinum. Innihaldsliga verður lógin ikki broytt í hesum umfarinum.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Uttanlandsnevndin, 7. mars 2023

Bjarni Hammer formaður	Bárður á Steig Nielsen næstformaður	Annika Olsen
Liljan Weihe	Jenis av Rana	Jacob Vestergaard
	Sólvit Nolsø	